# Hattar til steypafinaluna

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Fleyr til gul av útsynningi og vestri og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 10 og 13 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Fleyr til gul av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 13 og 16 stig, men har mjørki er, um 11 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Fyrrapartin fleyr til gul av ymsum ættum, men seinnapartin frískar hann vindin av suðri. Yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 11 og 14 stig.

**Veðrið Ólavsøkuaftan:**
Andøvsgul upp í ein strúk av suðri og regn, seinni sirm ella mjørki. Hitin millum 10 og 13 stig.

**Veðrið Ólavsøkudag:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útsynningi og ælaveður, men eisini sólglottar. Hitin millum 9 og 12 stig.

**Tá B36 og KÍ fara á vøllin í steypafinaluni á Tórsvølli verður møguleiki hjá viðhaldsfólki hjá teimum báðum liðunum at ogna sær serligar hattar, sum vísa, hvørjum liði tú stuðlar**

HATTAR
*Stefan í Skorini*



*Sermerktu hattarnir, sum eru keyptir heim til steypafinaluna, fara óivað at seta dám á steypafinaluna*

Fyri fyrstu ferð verður finalan um Løgmanssteypið spæld á ólavsøku, og finaludysturin verður sunnudagin klokkan 16, tá B36 og KÍ bresta saman.

Hetta verður ein festligur dagur við fleiri tiltøkum kring vøllin undan og aftaná finaluna. Nógv viðhaldsfólk hjá hesum báðum liðum fara at leita sær oman í Gundadal sunnudagin, og rómurin verður óivað í topp, tá tey litríku viðhaldsfólkini møtast við vøllin.

Nita Sørensen, handilskvinna í Havn, hevur tikið stig til at gera henda dagin enn litríkari.

Hon hevur nevniliga bílagt nógvar høgar hattar, sum bera litirnar hjá liðunum báðum. Hon hevur fingið svartar og hvítar hattar til B36-arar og hvítar og bláar til klaksvíkingar.

Harumframt hevur hon eisini fingið svartar og reyðar hattar til hitt havnarfelagið, hóast tað ikki skal spæla finalu. HB spælir nevniliga dagin fyri móti Hvidovre við Óla Johannesen á liðnum.

### Fæst undan dystinum

Nita Sørensen eigur handilin Seytjan á Áarvegnum í Havn, og har fer hon at selja øll trý sløgini av hattum. Í Klaksvík ber til at keypa KÍ-hattarnar á Statoil støðini, og kostnaðurin er 150 krónur.

Týsdagin fekk Nita sendingina av hattum heim til Føroyar, og teir fáast nú til keyps. Longu áðrenn hattarnir vórðu settir til sølu, vóru 400 hattar umbidnir, so tað týðir uppá, at teir verða væl seldir.

Nita sigur, at hon knappliga fekk hugskotið, og tí fór hon beinanvegin at fáa hattarnar til vega. Hon hevur bílagt fleiri hattar heim til Føroyar, men hon ivast ikki í, at teir flestu verða seldir.

Hon heldur, at tað fer at seta ein serligan dám á finaluna, um øll viðhaldsfólkini fara at ganga við slíkum hattum. Tað verður sum til teir stóru dystirnar í útlondum, tá áskoðarar veruliga gera seg út.

Umframt at hattarnir verða seldir í Seytjan í Havn og í Statoil í Klaksvík, so verða hattarnir eisini at fáa til keyps uttanfyri Tórsvøll undan finaluni.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 8 |
| Nuuk | 4 |
| Qaqortoq | 9 |
| Ammassalik | 9 |
| Saint John's | 21 |
| Halifax | 21 |
| Reykjavík | 12 |
| Seyðisfjørður | 7 |
| Tórshavn | 10 |
| Lerwick | 12 |
| Aberdeen | 17 |
| London | 23 |
| Tromsø | 14 |
| Bergen | 17 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 23 |
| Keypmannah. | 22 |
| Helsinki | 23 |
| Moskva | 27 |
| Berlin | 26 |
| Warzawa | 23 |
| Kiev | 29 |
| Bukarest | 25 |
| Paris | 22 |
| Madrid | 32 |
| Róm | 26 |
| Malorca | 30 |
| Athen | 30 |
| Malta | 28 |
| Tunis | 32 |
| Beijing | 30 |
| New Dehli | 32 |
| Bangkok | 34 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 15 |
| New York | 30 |
| Miami | 28 |
| Los Angeles | 20 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | 31 |
| La Paz | 12 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 10 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Lágtrýstið við Føroyar fer norðureftir og ein hátrýstryggur sunnann fyri Hvarvið fer eystureftir.




Lágtrýstið norðan fyri Føroyar hvørvur norðureftir og hátrýstryggurin sunnan fyri Ísland fer um Føroyar hósdagin.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 23/07 kl. 06[00]– 24/07 kl. 06[00]. Hitin í gjár: 10,6°
Minsti hiti máldur í juli 0,4° Mesti hiti máldur í juli: 20,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 6,0 mm – mált frá 23/07 kl. 06[00]– 24/07 kl. 06[00]
Avfallið higartil í juli: 41,9 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

| 27. juli: | Fyrra kvarter |
|---|---|
| 4. august: | Full sól |
| 5. august: | Mánin longst frá jørðini |
| 12. august: | Seinna kvarter |

Kelda. Álmanakkin 2001

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 25. juli | 11.26 | 23.51 | 10.26 | 22.51 | 10.41 | 23.06 | 01.02 | 13.26 | 02.02 | 14.26 | 09.41 | 22.06 | 08.41 | 21.06 | 11.41 | — | 00.17 | 12.41 | 11.11 | 23.36 | 00.02 | 12.26 |
| 26. juli | — | 12.14 | 11.14 | 23.37 | 11.29 | 23.52 | 01.51 | 14.14 | 02.51 | 15.14 | 10.29 | 22.52 | 09.29 | 21.52 | 00.06 | 12.29 | 01.06 | 13.29 | 11.59 | — | 00.51 | 13.14 |
| 27. juli | 00.37 | 13.11 | — | 12.11 | — | 12.26 | 02.37 | 15.11 | 03.37 | 16.11 | 11.26 | — | 10.26 | 23.01 | 00.52 | 13.26 | 01.52 | 14.26 | 00.22 | 12.56 | 01.37 | 14.11 |
| 28. juli | 01.46 | 14.22 | 00.46 | 13.22 | 01.01 | 13.37 | 03.46 | 16.22 | 04.46 | 17.22 | 00.01 | 12.37 | 11.37 | — | 02.01 | 14.37 | 03.01 | 15.37 | 01.31 | 14.07 | 02.46 | 15.22 |
| 29. juli | 02.59 | 15.23 | 01.59 | 14.23 | 02.14 | 14.38 | 04.59 | 17.23 | 05.59 | 18.23 | 01.14 | 13.38 | 00.14 | 12.38 | 03.14 | 15.38 | 04.14 | 16.38 | 02.44 | 15.08 | 03.59 | 16.23 |